# Sjómansheimið er aftur vorðið reytt

**- Vit málaðu Hotel Tórshavn fyrstu ferð fríggjadagin og aðru ferð leygardagin. Vit vóru 9 mans, og alt gekk væl, sigur Uni Zachariasen, málarameistari**

NÝMÁLAÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hotel Tórshavn hevur sum kunnugt fingið nýggjan eigara, og gamla sjómansheimið hevur nú eisini fingið "nýggjan" lit.

Og tó; liturin ikki so nýggjur kortini, tí sjómansheimið hevur áður verið reytt.

Tað er málarameistarin, Uni Zachariasen, sum stendur fyri málaraarbeiðnum.

- Vit málaðu allan bygningin fyrstu ferð fríggjadagin og aðru ferð leygardagin. Vit vóru níggju mans um hetta arbeiði, og alt gekk væl.

Uni sigur, at teir hava sett stillads um allan bygningin, og tí hevur sjálvt málaraarbeiðið gingið bæði skjótt og væl í hond.

- Á henda hátt er ikki neyðugt at flyta stilladsið, og hetta lættir nógv um – og sparir nógva tíð, tá ið slíkt arbeiði skal gerast.

Hann sigur, at nú bygningurin er liðugt málaður uttan, verður tekjan næsta stigið.

- Vit skulu eisini mála tekjuna, og tað verður gjørt so skjótt, tað viðrar.

Hann sigur, at ein partur av tekjuni er sink og ein annar partur stál.

Uni Zachariasen sigur, at teir hava brúkt nakrar hundrað litrar av reyðari máling til bygningin.

Spurdur, um hann kennir søguna aftanfyri, at bygningurin nú aftur er reyður, sigur hann:

- Vit hava sitið saman við leiðsluni og tosað um, hvussu vorðin bygningurin skuldi vera. Vit komu ásamt um, at reytt er ein hugnaligur og heitur litur, sigur Uni Zachariasen, málarameistari.




*- Nakrir hundrað litrar av reyðari máling eru farnir upp á bygningin, sigur Uni Zachariasen, málarameistari*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



Leiðari til eldraøkið

Ert tú rætti leiðarin

Tú hevur hugsanir um, hvussu eldraøkið kann mennast frameftir. Tær dámar avbjóðingar, og tú hevur evnini at leiða og motivera eitt ymisligt lið av leiðarum við ymisligum arbeiðsumstøðum.

Ljóðar hetta sum tú? So er eitt spennandi starv sum leiðari fyri eldraøkið leyst at søkja. Økið er í støðugum vøkstri, og tí krevst ein framsíggin persónur við góðum leiðaraevnum, ið setir framburð og trivnað í hásætið.

**Bygnaður og starv**
Deildin fyri eldraøkið er skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini. Deildin fevnir í høvuðsheitum um heimarøktina og ellis- og røktarheimini. Virksemið er kring alt landið. Deildin umsitur fyri uml. 250 milliónir krónur árliga. Tað eru í løtuni uml. 845 starvsfólk innan økið, harav 455 starvast í Heimarøktini. Leiðarin arbeiðir í tøttum samstarvi við økis- og stovnsleiðarar um alt landið.

Leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum í Heimarøktini og Serforsorgini.

Umframt deildina fyri eldraøkið eru fýra aðrar høvuðsdeildir undir Heimarøktini og Serforsorgini, og tí gongur leiðarin inn í eitt kollektiv av leiðarum.

Arbeiðsplássið er dynamiskt og umsitur eina sera týðandi samfelagsskipan. Økið hevur stóran almennan áhuga, tí tað fevnir um tænastu til nógv fólk, og tað er ein avbjóðing at liva upp til krøvini við teimum fíggjarligu kørmum, sum politiska skipanina setir.

Talan er um eitt tað størsta arbeiðsplássið í Føroyum, og tað økist, so hvørt fleiri uppgávur verða fluttar út í primeru heilsutænastuna.

**Uppgávur og krøv**
Leiðarin hevur fíggjarligu, fyrisitingarligu og fakligu ábyrgdina á øllum økinum. Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, og eingin dagur er eins.

Starvið krevur, at tú hevur viðkomandi útbúgving og hollar leiðslu- og starvsroyndir. Persónliga krevst, at tú hevur breiðan rygg og ert týðiligur. Leiðarin má eisini hava hegni og evni at koma fram til framtíðarloysnir og fremja tær í verki. Tað krevur millum annað, at tú dugir at skapa sambond og varðveita tey. Tú skal vera savnandi og skapandi, tí einki verður framt uttan í samstarvi við onnur.

Starvið gevur tær ávirkan, tú kemur í samband við nógv fólk og hevur góðar møguleikar fyri eftirútbúgving.

Um fleiri upplýsingar ynskjast ber til at ringja til Meginskrivstovuna á telefon 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra.

**Umsókn og freist**
Umsóknarfreistin er mánadagin 5. september 2005, og starvið verður sett skjótast tilber. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðkomandi skjølum skal sendast til:

Heimarøktin og Serforsorgin
Att: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

Heimarøktin og Serforsorgin

Eirargarður 2, 2. hædd, Tel 304020, Fax 304010, heimser@heimarokt.fo

www.sansir.fo